# <nýtt - nýtt>

3arin <nýtt - nýtt>

## Fløgur:

### Phil Collins



**Heiti:** Testify
**Skeringar:** 12
**Plátufelag:** Warner Music International/Face Value Records

### xXx - A New Breed of Secret Agent



**Bólkar:** Rammstein, Hate Breed, Moby, Nelly, Drowning Pool o.o
**Skeringar:** 20
**Plátufelag:** Universal Records

### Shania Twain



**Heiti:** Up
**Skeringar:** 19
**Plátufelag:** Mercury Records

### Sash



**Heiti:** S4!
**Skeringar:** 16
**Plátufelag:** X-IT Records

## Filmar

### The Mothman Prophecies



**Høvuðsleiklutir:** Richard Gere og Laura Linney.
**Longd:** 113 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Filmurin er gjørdur eftir veruligum hendingum. Eftir at hava hugt eftir teirra dreymahúsið, koma tíðindamaðurin, John Klein og kona hansara, Mary út fyri eini ferðsluvanlukku. Stutt áðrenn Mary doyr, sigur Mary: »Tú sást tað ikki, ha?«, og John finnur aftaná tekningar av einum veingjaðum skapningi. Nøkur ár seinni endar John á ein løgnan hátt í býnum Poin Pleasant. Saman við tí lokala politistinum, Connie, finnur John útav, at løgnu hendingarnar í býnum hava óhugnaligt samband við deyða Marys og tær tekningarnar, sum hon lat eftir seg. Spurningurin er bara hvørjar...

### Van the Man



**Høvuðsleiklutir:** Ryan Reynolds og Tara Reid
**Longd:** 88 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Ígjøgnum síni sjey ár á Coolidge College hevur V an Wilder eydnast at fáa eitt rykti sum ókrýndi veitslukongurin á skúlanum, og nú skal tann fitta og pena Gwen Pearson skriva eina grein um hann til skúlablaðið. Men tað villa lívið noyðist at fáa ein enda, tí pápi Wilder, letur lokið til pengakistuna aftur. Sjey ár á college er meira enn nóg mikið. Men so lætt letur »Van the Man« seg ikki kúga. Saman við vinunum leggur hann ætlanir um, hvussu hann kann halda áfram við lívinum sum ævigheitslesandi og veitsluapa...

### About a Boy



**Høvuðsleiklutir:** Hugh Grant, Toni Collette og Rachel Weisz
**Longd:** 97 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Will Freeman er ein, sum allir aðrir menn eru øvundsjúkir inn á: Hann koyrir ein skjótan bil, elskar leys forhold og sum 38 ára gamal hevur hann onga ábyrgd av nøkrum sum helst slagi. Inntil hann hittir Marcus. Ein løgin 12 ára gamaldrongur, sum vendir lívinum hjá Will upp og niður við stuttligum úrslitum. Filmurin er bygdur á bókina hjá Nick Hornby »About a Boy«, og tað eru teir somu, sum gjørdu Bridget Jones´s Diary, sum hava gjørt henda filmin...

### Charlotte Gray



**Høvuðsleiklutir:** Cate Blanchett, Billy Crydrup og Michael Gambon
**Longd:** 117 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Frankaríki undir týsku hersetingini í 1942. Charlotte Gray er ein ung skotsk kvinna, sum er ein loyniligur eftirlitsmaður. Hon meldar seg frívilliga til fronsku mótstøðurørsluna. Hennara veruliga mál er at bjarga sínum elskara, sum er í tí enska loftherinum. Men hon uppdagar skjótt, at verðin er full av loynidómum, og at hon bara kann stóla uppá seg sjálva. Filmurin er bygdur á skaldsøguna hjá Sebastian Faulks.




## Hugh Grant og Hurley – enn einaferð



Nú er slaturin farin at ganga um, at Hugh Grant og Liz Hurley hava funnið saman aftur, eftir at hava verið frá hvørjum øðrum í eitt longri tíðarskeið.
Tey bæði avsanna slaturin og siga, at tey einans eru vinir.
Men hvussu er og ikki, so hevur Hugh stuðlað og hjálpt Hurley væl, síðani hon rýmdi frá Steven Bing, sum hon eigur sonin, Damien, við. Tey bæði hava eisini verið á skíferiu í St. Moritz, og har sóu tey út til at vera nógv meira enn bara vinir.

## Nicole Kidman vann Golden Globe



Nicole Kidman streyk avstað við heiðrinum sum besti kvinnuligu leikari fyri sín leiklut í filminum The Hours. Í hesum leiklutinum er Kidman ikki til at kenna aftur, tí hon hevur broytt sína útsjónd, at sjálvt hennara nærmastu vinir siga, at teir ikki høvdu kent hana, um tey ikki vistu, at tað var hon. Og so sum Kidman altíð ger, spælir hon knasandi væl í filminum. Og tað hevur hon so fingið løn fyri nú.
Spennandi verður at vita, um hon eisini verður í uppskoti til Oscar virðislønina, sum er einasta virðisløn, sum verður mett hægri enn Golden Globe. The Hours vann eisini Golden Globe fyri besta film.
Virðislønina fyri besta mannliga leikari í einum filmi vann Jack Nicholson fyri sín leiklut í filminum About Schmidt.
Onnur, sum eisini vunnu sær eina Golden Globe virðisløn vóru: Renee Zellweger, Chicago, Richard Gere, Chicago, og Meryl Streep, Adaption.
Innan sjónvarp vunnu millum onnur hesi Golden Globe: Jennifer Aniston, Vinir, Uma Thurman, Hysterical Blindness og Kim Cattral, Sex and the City.

## Madonna hatar Ongland



Madonna er vorðin so troytt av at búgva í Onglandi, at hon nú hevur gjørt av at selja húsið. Vinir hjá Madonnu siga, at hon stutt sagt hatar Ongland. Tey siga, at henni dámar ikki veðrið, fólkið ella nakað, sum hevur við Ongland at gera.
Tí hevur hon gjørt av, at børnini Lourdes og Rocco skulu vaksa upp í USA. Men tað er ikki gott at vita, hvat gemalurin, Guy Ritchie sigur til tað, tí hann er breti burturav. Honum dámar ikki at búgva í USA, og hann hevur fleiri ferðir funnist at tí. So um flytiætlaninar hjá Madonnu fara at enda við hjúnarskilnaði – tað kann tíðin bara vísa.

## Gwyneth Paltrow og Chris Martin



Tað sær ikki mætari út enn, at sambandið millum tey bæði Gwyneth Paltrow og forsangaran í Coldplay, Chris Martin, bara verður heitari og heitari. Og tað gongur eisini skjótt fyri seg, tí tað er ikki so langt síðani, at tey vórðu sædd saman fyrstu ferð, men tá einans sum vinir.
Gwyneth skal í øllum førum hava hildið jól saman við Chis og hansara foreldrum í Exeter í Onglandi. Síðani hava tey bæði verið heima hjá Paltrow, har tey hava fingið tíðina at ganga við millum annað at fara í januarútsølu.

## Hollywood er rasistiskt



Hetta sigur Salma Hayek, sum er av meksikanskum uppruna.
Hon sigur, at um rasisma hevði eitt annað navn, so var tað Hollywood. Hon sigur, at tað verður gjørdur týðiligur munur á henni, tí hon er meksikansk og so øðrum, sum ikki eru av øðrum uppruna.
- Í Hollywood hyggja øll niður á teg, um tú ert av meksikanskum uppruna.
Ein kann vera púra vísur í, at ein ikki er ynsktur har, sigur Salma Hayek í øðini. Hon spælir júst nú við í filminum Frida. Upptøkurnar ganga fyri seg í Meksiko og eru ikki lidnar enn.
Júst hví Salma Hayek kennir seg so niðurgjørda av Hollywood, sigur søgan tó onki um.

## Maurice Gibb skeiva viðgerð



Nú eru tey avvarandi hjá Maurice Gibb farin at tosa um, at tá Bee Gees-sangarin Maurice Gibb andaðist á Mount Sinai sjúkrahúsinum í Miami, var tað tí hann fekk skeiva viðgerð.
Gibbs bleiv innlagdur við ógvusligari pínu í maganum, og sagt var, at orsøkin til pínuna var blokeringar í tarmunum. Hann bleiv lagdur undir skurð og kom fyri seg aftur. Tey avvarandi tosaðu tá við hann, men brádliga fekk hann hjartaslag, og tað megnaði kroppur hansara ikki. Sjúkrahúsið avsannar tó alt tos um, at Gibb fekk skeiva viðgerð.



## Leysatíðindi

– Lisa Marie Presley er møguliga við barn. Pápi at barninum er Nicholas Cage. Teirra avbera stutta hjúnarlag, sum vardi einans tríggjar mánaðar, fór annars í vaskið, tí Presley segði, at hon ikki vildi hava fleiri børn.

–Jennifer Lopez vildi hava tann flotta og dýra handilin Barney´s í New York at steingja fyri øllum øðrum, so at hon kundi keypa inn í frið og náðum, men tað fekk hon eitt stutt og greitt nei til.



– Meg Ryan hevði helst fingið skeiva beinið út úr songini ein dagin, tá hon var og keypti. Hon skeldaði damuna, sum fekk henni út, tí hon helt ikki, at hon gjørdi nóg skjótt av.



– Harrison Ford var deyðanum nær ein dagin, tá hann sjálvur legði kropp til eina stuntscenu. Ford er 60 ára gamal, men tað heldur honum ikki aftur. Han sat í einum bili, sum koyrdi inn í ein vegg, men hann slapp tó við smávegis snuddum.

– Drew Barrymore er púra vekk í sjeikinum hjá sær, rocktónleikarin, Fabrizio Moretti. Tað skal eitast so, at hon er tilreiðar at gifta seg við honum. Um so verður, so verður hetta triðju ferð, at Drew giftist.




## topp.10/dvd

01. charlotte gray
02. 40 days and 40 nights
03. gamle mænd i nye biler
04. reg: 1 - xxx
05. van the man
06. reg. 1 – minority report
07. resident evil
08. showtime
09. men in black 2
10. reg. – mr. deeds

## topp.10/cd-rom

01. age of mythology
02. unreal tournament 2003
03. the sims – unleashed
04. battlefield 1942
05. sim city 4
06. total club manager 2003
07. the sims – deluxe edition
08. zoo tycoon
09. war craft III
10. mafia

## topp.10/fløgur

01. eminem: 8 mile
02. ymiskt: now 2
03. avril lavagne: et go
04. roxette: the ballad hits
05. westlife: unbreakable
06. robbie williams: escapeology
07. eminem: the eminem show
08. nirvana: nirvana
09. jennifer lopez: this is me ... then
10. ymiskt: big hits 2002

## topp.10/video

01. charlotte gray
02. pinocchio
03. van the man
04. 40 days and 40 nights
05. terror i høj fart
06. men in black 2
07. resident evil
08. unfaithful
09. scorpion king
10. ice age

3arin